








# TROUBADOURURIN TERJI OG ÚRMÆLINGARNIR

**UMRØÐA** Terji hevur skrivað seg og síni løg inn í føroysku fólkasálina. Og har eru tey ritað, sum rúnur í stein.

Dagfinn Olsen
Myndir: Jens Kristian Vang

Terji Rasmussen og Føstufressar høvdu útgávukonsertir í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið. Hetta hendi í samband við, at Terji og fressarnir fyri nøkrum mánaðum síðani góvu út næstu fløguna. Hetta umleið 20 ár eftir, at fyrra fløgan kom út.

Alt hetta er langt síðani søga, fyrra fløgan hevur sítt heilt serstaka pláss á hillini við føroyskum útgávum og í hugaheiminnum hjá mongum. Heiðurin sum aldarinnr fløga fekk útgávan eisini. Fløgan er ein hin mest selda í Føroyum nakrantíð.

Alt hetta er søgan og leiktjøldini, nú seinna fløgan kom út, og útgávukonsert nú hevur verið. Ikki smávegis pallur, ið nýggja fløgan skal fylla, fyri ikki at standa í skugganum av fyrru fløguni.

Og tí vóru vónirnar stórar, og somuleiðis áhugin manna millum, nú útgávukonsert loksins kom á skránna.

Stuttligt er her at viðmerkja, at tá fyrra fløgan kom, var útgávukonsert innan fólk kendu fløguna og tónleikin. Fløgan hevði heldur ikki góð sølutøl, fyrr enn rúm tíð var farin, men eins langa tíð tað tók føroyingum at taka hana til sín, líka fast hevur hon fest seg í føroysku fólkasálina.

Hesaferð valdi Terji at bíða, til fløgan hevði havt ein møguleika. Og kanska er søgan ikki bara so einføld, tí sjálvsagt er eisini nakað við at fáa alt at passa saman, Norðurlandahúsið og so at savna tónleikararnar somu tíð undir som lon. Men meira um tað seinni.

## Gránað ella fánað hár

Lýst var framman undan konsertini fríggjakvøldið í Norðurlandahúsinum, at eykakonsert bleiv leygarkvøldið. Útselt var nevniliga til konsertina fríggjakvøldið og, skilst, eisini til konsertina leygarkvøldið.

Hjá okkum, sum náddu at fáa atgongumerkið fríggjakvøldið, var spenningur í luftini. Og komin í Norðurlandahúsið kendist týðuliga, at spenningurin var manna millum, meðan mong nutu eina øl, ið til høvið hevði fingið heitið Grønur Skaldadrykkur, vísandi til kendan sang av fyrru fløguni.

Fleiri lurtarar hetta kvøld sótu óivað eisini í Norðurlandahúsinum fyri 20 ella 21 árum síðani. Hárini grá ella fá, men annars ikki so nógv broytt.

Og so byrjaði konsertin fyri fultsettum sali. Saman við Terja og Føstufressum komu vit ígjøgnum nøkur løg. Og Terji tók fyri fyrstu ferð orðið millum løgini. Hetta gjørdi hann ikki nógv við hetta kvøldið.

Og tað var nú eisini sangirnar, tónleikin, vit vildu hoyra.

Og har komu øll løgini, blandað av fyrru og seinnu fløguni. Allar perlurnar!!

Terji hevur skrivað seg og síni løg inn í føroysku fólkasálina. Og har eru tey ritað, sum rúnur í stein. Løgini eru ikki altíð so lett, ganga ikki altíð eftir uppskriftum, ið onnur helst vildu hildið verið léttari. Ein ummælarastarvsfelagi spurdi meg einaferð, um tað ikki kundi vera nakað um, at Terji í grundini kvøður - skrivar kvæðir? Og eg havi viðhvørt hugsað eitt sindur um hetta, og kanska er hetta ikki av leið. Í øllum førum hóska mangar av perlunum ikki altíð inn í sama tónleikakassa, sum vanligu og siðbundnu sangirnir. Terji er egin í so máta.

Og framførslunum er heldur ikki at fara skeivur av. Inniligar, og ein veit, at hetta er Terji.

Samspælið við orðasnillingin Anker Eli Petersen er eisini heppið og saman eru teir upphav til hesar perlurnar, sum savnaði so nógv fólk um viku-skiftið. At Anker Eli eisini er myndlistamaður bera fløgurnar boð um, eins og pallmyndin.

## Plúmm í

Longu tá Terji fyri yvir 20 árum síðani gjørdi av at gera ein plátu í egnum navni, hevði hann eftir øllum at døma ta greiðu ætlan, at hann vildi nakað, hann satsaði. Og hann legði góðar lunnar undir ætlanina við at samstarva við limir í bolkinum Plúmm, ið til høvið fingu heitið Føstufressar. Hesin bólkurin av unglingum, ið flestir vuksu upp saman, barndómsvinir, ið allir innan teir fyltu 20 vístu sínar tónleikagávur, og hvørs lagna tóktist avgjørd. Hvør í sínum lag úrmælingar á síni ljóðføri. Og allir gjørdust teir eisini tónleikarar. Kanska vert at merkja sær, at vit enn vóru í eini tíð, har ein ikki bert slongdi út, at ein ætlaði at liva sum tónleikari, og enn minni gjørdi álvara av hesum. Tónleikur var fyri tey flestu nakað, ið hoyrdi undir ítriv.

Henda unika søgan um vinirnar, ið gjørdust millum Føroya allar bestu, er søgd ofta, men hoyrir hesi søgu til.